## Undirvísarar

Søkt verður eftir 2 lærarum til Maskindeildina, sum serliga koma at undirvísa lærlingum, SIT-, AT- og HT-næmingum.

**Førleiki**
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur yrkisprógv sum maskinsmiðjur. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur yrkisroyndir og hevur undirvíst.

**Setanartreytir**
Talan er um føst størv við eftirlønarskipan sambært sáttmála ímillum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

**Byrja**
Størvini verða sett frá 1. august 2002

Meiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

Umsóknir við prógvum og c.v. skulu sendast skúlanum innan 4. juni 2002.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
Fo-700 Klaksvík

## Frá Vágs skúla

Søkt verður eftir einum lærara við fullum tímatali, í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/2003, fyri lærara í farloyvi.

Eitt tíðaravmarkað starv við fullum tímatali, vegna lækkað tímatal, og møguliga eitt tíðaravmarkað parttíðarstarv.

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Nærri upplýsingar um størvini fáast frá skúlaleiðaranum Óla í Hjøllum tlf. 373192.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu verða Skúlastýrinum fyri Vágs skúla í hendi í seinasta lagi 28. mai 2002.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Agnes Tausen
900 Vágur


## Sethúsaklæðningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


## Starv sum sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir lærara til Føroya Sjómansskúli frá 1. august 2002.

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv ímillum leiðslu, lærarar og næmingar.

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi útbúgving
- Helst hava undirvíst áður
- Kunna undirvísa í náttúrulæru, el-læru, skipstøkni og enskum
- Hava góðar samstarvseginleikar
- Hava góðar royndir innan teld

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Fakfelag Sjómansskúlalærara

Umsóknir skulu sendast til Føroya Sjómansskúla, Nóatún 2, Postboks 104, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 3. juni 2002.

**Føroya Sjómansskúli**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Tekniski Skúlin Tórshavn søkir lærara

Til útbúgvingina »Framleiðslutøkningur« (Produktionsteknolog) verður søkt eftir lærara, starvið er eitt fulltíðarstarv.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum verkfrøðingur, ella tilsvarandi útbúgving. Fyrimunir eru at umsøkjarar hava royndir innan organisation, leiðslu og planlegging (logistik).

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað snýr seg um pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið verður sett 1. august 2002.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 6. juni 2002.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan, tlf. 311957.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**

## Pedagogar

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir tveimum pedagogum til at byrja 15. august 2002.

Størvini eru fulltíðarstørv (40 tímar), annað starvið er í barnagarðinum, har ganga 20 børn í aldrinum 3 til 7 ár, og hitt starvið er í vøggustovuni, har ganga 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár.

Vit kunnu bjóða starv í einum lítlum stovni, har dentur verður lagdur á trivnað og gott samstarv og vænta vit eisini, at tú ert áhugað/ur at skapa trivnað, er kreativ/ur og hevur góð samstarvsevnir.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 13. juni 2002.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri stovnin Jónu Jacobsen á tlf. 421660.

## Avloysari

Søkt verður eftir einum fólki skjótast tilber, ið kann virka sum avloysari tá starvsfólk á stovninum eru burtur vegna frítíð, sjúku o.a.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri stovnin Jónu Jacobsen á tlf. 421660.

**Kvívíkar kommuna**

## Fólk søkist

Søkt verður eftir lastvognsmekanikara ella manni, ið er vanur at arbeiða uppá lastvognar og bussar, at byrja beinanvegin

SCANIA

**Fa. Johs. Berg**
Staravegur 1–3
100 Tórshavn
Tlf. 313555

## Felagsskúlin á Oyrabakka

Søkt verður eftir lærara skúlaárið 2002/2003 fyri lærara, sum hevur farloyvi.

Lærugreinir: støddfrøði, alis-/evnafrøði, enskt og søga/samtíð í framhaldsdeildini.

Starvið er tíðaravmarkað og verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu sendast til Felagsskúlan á Oyrabakka í seinasta lagi 31. mai 2002.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 422084 ella tlf. 423098.

**Felagsskúlin á Oyrabakka**
FO-450 Oyrabakki




Vask Vask Vask

**Vaskarí & Reingerð hevur brúk fyri fólki, ið dáma at hava við reingerð at gera**

**Vit hava brúk fyri fryntligum og tilkomnum fólki til høvuðsreingerð og til fastar vaktir eftir vanliga arbeiðstíð, umframt verður søkt eftir avloysarum til summarið 2002, í Tórshavn.**

**Ljóðar hetta áhugavert fyri teg/tykkum, og vilt tú verða ein partur av einum dynamiskum team'ið, vinarliga setið tykkum í samband við tlf. 283934, og fáið meiri at vita.**

Vaskarí & Reingering

Tænasta síðani 1983


## Feriuavloysari

*Føroya Egg søkir eftir feriuavloysara í tíðarskeiðinum 1. juli til uml. 10. august 2002.*

*Viðkomandi skal hava koyrikort.*

*Ert tú álítandi og hevur hug at royna nakað nýtt í summarferiuni, so royn hettar.*

*Tú fært møguleikan at royna teg einsamallan í uml. 2 vikur frá uml. 15. juli til og við 30. juli 2002.*

*Arbeiðið fevnir fyri ein stóran part um at pakka egg og koyra tey til handlarnar og hava eftirlit við at alt virkar sum tað eigur.*

Føroya Egg av Velbastað

***P/F Føroya Egg***
***FO-176 Velbastaður***
***Tel. 21 58 00 ella 32 80 58***

## Lærarar
### til skúlarnar í Tvøroyrar kommunu

Skúlastýrið í Tvøroyrar kommunu søkir eftir lærarum til skúlarnar í kommununi skúlaárið 2002/2003.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2002/2003, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi.

4 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar sum hava niðursett tímatal.

Upplýsingar til størvini fáast við at venda sær til skúlastjóran, tlf. 371582.

Umsóknir til størvini skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

**Skúlastýrið**
**í Tvøroyrar kommunu**
v/ Chris Jan Michelsen


## Brúktur Seat Arosa Diesel




Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

## Brúktur VW Passat
í góðum standi




Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo


**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

## Húsavørður

Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri húsavørð í tíðarskeiðnum 5. august til 1. september 2002.

Starvið umfatar alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Starvið umfatar eisini smærri umvælingar, og er tað tí ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur handverkaraútbúgving. Somuleiðis er tað eitt ynski at viðkomandi hevur koyrikort.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna á tlf. 371666.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir verða at senda til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
Fyristøðukvinnan
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist: 1. juni 2002.**





ÍBýin
- hvønn hósdag